# Kappingarneytar á felags bási á triðja sinni

**Tað hevði sæð undarligt út, um Statoil og Shell vóru á felags bási á fiskivinnustevnuni. Líka so undarligt hevði tað sæð út, um Føroya Sparikassi og Føroya Banki høvdu felags bás. Men kappingarneytar kunnu saktans samstarva um bás. Tað eru Radiobúðin í Runavík og Radioservice í Havn prógv um**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Teir eru kappingarneytar – selja somu útgerð og somu merkir, men eru nú á triðja sinni á felags bási á North Atlantic Fish Fair. Menninir á myndini eru Alvi Joensen, sum umboðar Radiobúðina og Jóhan Simonsen, sum starvast hjá Radioservice*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er ikki av tilvild, at Radiobúðin í Runavík og Radioservice í Havn, sum umboða somu vørur, eru á felags bási á North Atlantic Fish Fair.

– Vit hava havt felags bás øll árini, síðan NAFF fyrstu ferð varð hildin í 2001, og tað hava vit eisini hesaferð, nú stevnan verður hildin á triðja sinni. Hetta hevur riggað væl, hóast vit kappast um marknaðin, siga teir báðir, Alvi Joensen og Jóhan Simonsen, sum vit hittu á básinum stutt eftir, at latið varð upp fyri stevnugestunum.

Bæði Radiobúðin og Radioservice selja skips-og bátaútgerð, og báðar fyritøkurnar veita sínum viðskiftafólki tænastu.

### Somu vørur

Spurdir, um fyritøkurnar umboða ymisk merki, siga Alvi og Jóhan, at báðar umboða tey kendastu merkini á hesum øki, sum eitt nú Furuno, Sailor, Simrad og Scanmar.

– Í Føroyum er tað ikki soleiðis, at ein fyritøka hevur einaumboð upp á hesi merki. Tískil umboða bæði Radiobúðin og Radioservice tey kendastu – og somu merkini – innan tøkni til skip og bátar.

Alvi Joensen og Jóhan Simonsen siga, at tá ið vitjandi eru á básinum er tað ikki soleiðis, at onnur fyritøkan fer avstað við viðskiftafólkunum hjá hinari.

– Vit lata viðskiftafólkini sjálvi avgera, hvagar tey venda tær, tá ið tey koma inn á básin – og hvønn tey vilja tosa við.

– Tað er eisini soleiðis, siga teir báðir, at tey, sum eru á básinum fyri Radiobúðina og Radioservice, eru hvørjum øðrum til hjálpar, um brúk er fyri tí. Jú, vit kunnu ikki siga annað enn, at samstarvið hevur riggað væl, og tí eru vit nú á triðja sinni á felags bási, siga Alvi Joensen og Jóhan Simonsen.

### Nýggj útgáva

Á felags básinum hjá Radiobúðini og Radioservice er eisini danin, Klavs Torp, sum umboðar donsku fyritøkuna, Polaris Electronics.

Klavs greiðir frá nýggjastu útgerðini, og fara vit í komandi viku at venda aftur til tað nýggjasta, sum er á marknaðinum í løtuni.

Í stuttum kann sigast um merkini, sum Radiobúðin og Radioservice umboða, er, at Furuno er best kent sum navigatiónsútgerð, Sailon sum samskiftisútgerð og Simrad sum útgerð til at leita eftir fiski.



*Danin, Klavs Torp, sum umboðar Polaris Electronics, er felagsbásinum hjá Radiobúðini og Radioservice*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Teir marknaðarføra Faroexpo á NAFF

**– Faroexpo knýtir mentan og vinnu saman og tær fyritøkur, sum ynskja at verða við, fáa høvi at skapa nýggj sambond og fáa holla vitan um eitt nú útflutningsmøguleikar, sigur Símun Hammer á Spf. Virkisráðgevingini, sum er á básinum hjá Runavíkar kommunu**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Á North Atlantic Fish Fair marknaðarføra teir ráðstevnuna, Faroexpo, sum verður í Runavík, 25.-27. oktober*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á básinum hjá Runavíkar kommunu á North Atlantic Fish Fair er eisini Spf. Virkisráðgevingin, sum heldur til á Høgabóli í Saltangará.

Á NAFF kunnar Virkisráðgevingin serliga um Faroexpo, ið er ein ráðstevna, sum verður í Runavík í heyst. Umframt at geva íblástur og at skapa mennandi samstarv millum føroyskar og útlendskar fyritøkur og stovnar, verða ein røð av áhugaverdum og undirhaldandi mentanartiltøkum í samband við ráðstevnuna.

Faroexpo knýtir mentan og vinnu saman og tær fyritøkur, sum ynskja at verða við, fáa høvi at skapa nýggj sambond og fáa holla vitan um eitt nú útflutningsmøguleikar.

### Fyrilestrar

Fleiri fyrilestrar verða á Faroexpo, sum fara at snúgva seg um mong ymisk viðurskifti, eitt nú útflutningsfígging, avbjóðingar á nýggjum marknaðum, leiðslukrøv í altjóða høpi, ES-skráir fyri samstarvsverkætlanir, uppkeyp av fyritøkum á øðrum marknaðum, økismenning og krøv til leiðslu á altjóða støði.

– Fyrilestrarhaldararnir eru persónar, sum hava veruliga ávirkan á búskaparviðurskiftini í Evropu, eitt nú umboð fyri ES-fyrisitingina, privatir vinnurekandi og akademikarar, sigur Símun Hammer á Virkisráðgevingini, sum er til reiðar at greiða áhugaðum fyritøkum frá, hvussu tær kunnu tryggja sær luttøku á Faroexpo, sum verður í døgunum, 25.-27. oktober.